ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK
TLF 341800

*– Sjálvandi frøir tað meg, at fólk hava so stórt álit á mær*

*Margot Wallström*

# Tað skal vera ein kvinna

**Hóast Göran Persson ikki fer frá sum floksformaður fyrr enn í vár, er stríðið um formansstarvið longu byrjað. Tey flestu vilja hava eina kvinnu í starvið, men tær best umtóktu vilja ikki**

Valúrslitið sunnudagin var tað ringasta hjá svensku sosialdemokratunum í 85 ár, og tað tykist tí greitt, at flokkinum tørvar eitt ella annað serstakt fyri at koma fyri seg aftur. Eitt uppskot kundi verið at velja eina kvinnu til formann, tí síðani flokkurin varð stovnaður fyri 117 árum síðani, hava bara menn sitið í formansstarvinum.

Tað eru eisini fleiri, sum tala fyri, at flokkurin eigur at velja sær eina kvinnu til formann, tá Göran Persson fer frá í vár.

– Stundin er komin til at velja eina kvinnu í formansstarvið. Meginparturin av okkara veljarum eru kvinnur, og vit eiga at vísa teimum, at vit taka tær í álvara, sigur sosialdemokratiski ES-tinglimurin Inger Segelström við Aftonbladet.



*Margot Wallström verður helst formaður í sosialdemokratiska flokkinum í Svøríki - um hon vil*

### Wallström best egnað

Flestu eygleiðarar eru á einum máli um, at tann best skikkaða kvinnan til formansstarvið í sosialdemokratiska flokkinum er tann 51 ára gamla Margot Wallström, sum er varaformaður í ES-nevndini. Hon hevur leingi verið umrødd sum eftirmaður hjá Göran Persson, men síðani 1999 hevur hon hildið seg uttan fyri svenskan politikk, tí tey bæði sótu ikki so væl um sátt.

Ein kanning hjá svensku bløðunum í gjár vísti, at tey flestu vilja hava Margot Wallström at taka við. Tað sama siga fleiri leiðandi sosialdemokratar, men sjálv hevur hon fyrr víst hugskotinum frá sær. Spurningurin er, um hon broytir hugsan, nú Persson fer frá.

– Tað frøir meg, at fólk hava so stórt álit á mær, segði Margot Wallström í gjár, men skundaði sær at leggja afturat, at sum er hevur hon bestan hugin at fullføra arbeiði sítt í ES-nevndini.

### Ikki í Ríkisdegnum

– Margot verður floksformaður, um hon vil, men eg eri ikki vísur í, at hon vil hava starvið, sigur ein ónevndur aðalstjórnarlimur við Svenska Dagbladet. Onnur halda, at hon hevur tann trupulleika, at hon situr ikki í Ríkisdegnum, og at flokkurin kann ikki hava ein leiðara, sum ikki er tinglimur.

Tað er tann 53 ára gamla Wanja Lundby-Wallin heldur ikki. Hon er formaður í fakliga landsfelagsskapinum og hevur verið nevnd sum komandi floksformaður, men sambært Svenska Dagbladet ætlar hon sær ikki at stilla upp.

Ein onnur kvinna verður nevnd. Tað er tann 49 ára gamla Mona Sahlin. Fyri tíggju árum síðani royndi hon at fáa formansstarvið, men tapti fyri Göran Persson. Síðani hevur hon havt eina heldur baldruta tíð orsakað av ymsum gølum, men tey seinastu árini hevur hon verið ráðharri og tykist hava fingið náði innanfloks. Kortini verður hon ikki hildin at hava sama umdømi í flokkinum sum fyri tíggju árum síðani.

Aðrar kvinnur, sum verða nevndar, eru tann 42 ára gamla Carin Jamtin, sum er ráðharri í menningarmnálum, og tann 38 ára gamli samferðslumálaráðharrin Ulrica Messing. Tær hava tó neyvan tær neyðugu royndirnar til formansstarvið.

### Aftur ein maður?

Skuldi tað hent, at Margot Wallström stendur við sítt, og at Mona Sahlin verður vrakað, kann tað væl henda, at maður kemur í mans stað.

Tað er heldur einki at ivast í, at fleiri fara at bjóða seg fram at taka við eftir Persson í vár. Ein teirra er løgmálaráðharrin, tann 44 ára gamli Thomas Bodström. Men hann hevur tann veikleika, at hann er rættiliga nýggjur í flokkinum.

Aðrir, sum verða nevndir, eru 43 ára gamli fíggjarmálaráðharrin, Per Nuder, og tann 41 ára gamli vinnumálaráðharrin, Thomas Östros. Teir hava verið í flokkinum leingi, men eru ikki so kendir almet. Kortini verða teir mettir sum formansevni.

---

# Tað verður stríð um Útnyrðingsleiðina

**Bráðnar ísurin norðanfyri, soleiðis sum vísindafólk vænta, kann tað elva til stríð um, hvør skal hava ræðið í økinum, sum tá kemur undan kavi. Olja og gass kunnu verra undir havbotninum**

Farleiðin eystur og vestur ígjøgnum tað arktiska økið er vanliga so full av ísi, at tað er ikki siglandi har, men nú ísurin eftir øllum at døma minkar, eru reiðarar og onnur farin at hugsa um, hvussu nógv kann sparast í framtíðini við at sigla tann vegin. Tað skrivar Svenska Dagbladet.

– Granskarar siga, at ísurin hvørvur kanska longu í 2020 ella kanska í 2070, men skuldi tað hent, at hann hvørvur um eini 20 ár, ræður longu nú um at fyrireika seg til tær broyttu umstøðurnar, sigur hernaðarserfrøðingurin Robert Hucbert á lærda háskúlanum í Calgary í Kanada við blaðið.

Tann stóri áhugin fyri økinum, sum kemur undan ísinum, kemst ikki bara av, at vit fáa eina nýggja siglingarleið. Granskarar halda, at tað eru góðir møguleikar at finna olju og gass undir havbotninum har.

Kanada og USA hava í áravís tingast um viðurskiftini í tí arktiska økinum, men higartil eru tey bara vorðin samd um at vera ósamd. Kanada hevur alla tíðina hildið uppá, at tað opna havið norðanfyri meginlandið verður kanadiskt havøki, meðan skiftandi amerikanskar stjórnir hava havt ta áskoðan, at havleiðin verður altjóða siglingarleið. Tað sama siga Russland og ES.

Kanadiski forsætisráðharrin, Stephen Harper, hevur fleiri ferðir sagt, at Kanada eigur at økja sítt hernaðarliga virksemið norðanfyri, men higartil hevur stjórnin ikki havt teir neyðugu pengarnar til tess.

– Vit hava ikki tað góða eftirlitið, og okkara ísbrótarar eru gamlir, sigur Robert Hucbert við Svenska Dagbladet.

Granskarar ivast ikki í, at ísurin fer at bráðna, men teir vita ikki nær, og hvussu. Teir flestu halda, at tey fyrstu árini fara stór ísfjøll at reka á havinum, soleiðis at farleiðin ikki verður egnað til sigling fyribils.

Í fjør vóru annars 100 ár, síðani Roald Amundsen sum tann fyrsti sigldi við skipi ígjøgnum Útnyrðingsleiðina.